Sosialurin

Nr. 21 - 30. januar 2008

## Roykti í flogfarinum

Løgreglan í Kastrup-floghavnini tók í gjárkvøldið ein mann. Málið byrjaði, tá manningin á einum flogfari bað um hjálp, tí ein drukkin ferðamaður hevði fest sær í inni á einum wc í flogfarinum. Løgreglan kom umborð á flogfarið og tók mannin, men tá løgreglumenninir vóru á veg oman trappurnar við manninum, legði hann fót fyri ein av løgreglumonnunum, sum datt oman trappurnar. Maðurin skuldi til grundlógaravhoyring í dag.



*Tað er framvegis ikki loyvt at festa sær í umborð á flogfari*

*(Mynd: TV2)*

## Færri ferðsluóhapp

Tiltøk hjá býarmyndugleikunum í Reykjavík at avmarka ferðsluóhappini í býnum hava givið góð úrslit, skrivar Morgunblaðið. Ein nýggj frágreiðing, sum umfatar árini frá 1996 til 2006, vísir, at hesi árini minkaði talið á ferðsluóhappum úr 603 í 1996 niður í 316 í 2006. Frágreiðingin vísir somuleiðis, at talið á álvarssomum óhappum er eisini minkað. Í 1996 vórðu 78 óhapp í býnum skrásett sum álvarssom, og í 2006 var talið 40.

Landingarmiðstøðin:

## Veitir tænastu eftir førimuni

**Herfyri høvdu vit samrøðu við útróðrarmann í Sandi, sum fýltist á, at teir, sum rógva út í oynni, sjálvir noyðst at syrgja fyri at fáa fiskin á fiskamarknaðin á Toftum, hóast fiskavirki er í oynni. Í Norðdepli og Hvannasundi vilja menn hava skipaða móttøku av fiski, men eina slíka tænastu kann Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík ikki veita teimum**



*- Landingarmiðstøðin er opin til midnátt, so útróðrarmenn um okkara leiðir kunnu altíð sleppa av við fiskin, sigur Pól Fugløe, landingarformaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg skilji væl, at útróðrarmenn í Sandoynni hava tað ógvuliga trupult, tá ið teir noyðast longu leiðina á Toftir við hvørjum sterti, teir fiska. Eisini her hjá okkum eru ein ávís misnøgd við, at vit ikki hava móttøku av fiski í Norðdepli ella Hvannasundi, men vit halda ikki, at hesin trupulleikin er so stórur.

Tað sigur Pól Fugløe, sum hevur verið landingarformaður hjá Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík síðan 2004.

- Sjálvandi hevði tað verið ynskiligt, at umstøðurnar hjá útróðrarmonnunum um okkara leiðir vóru uppaftur betri, men vit halda, at tænastan er á góðari leið.

Hann vísir á, at útróðrarmenn í Norðdepli og Hvannasundi hava eina skipan við Andreas Poulsen, sum koyrir fiskin hjá teimum til marknaðin í Klaksvík, og síðan tekur hann teimum kassar og ís við norður aftur.

- Útróðrarmenn skulu bara siga frá í góðari tíð, so fáa teir hesa tænastu, ið vit halda er á einari leið í mun til umstøðurnar hjá øðrum útróðrarmonnum kring landið.

Pól sigur, at teir, sum rógva út norðanfyri, gjalda eitt ávíst gjald fyri kilo, tá ið fiskur verður fluttur á marknaðin.

- Landingarmiðstøðin er opin til midnátt, so menn um okkara leiðir kunnu altíð sleppa av við fisk, leggur hann aftrat.

Hann vísir á, at sambært reglunum kunnu útróðrarmenn ikki longur koyra fiskin til marknaðin í opnum bili, tí Heilsufrøðiliga Starvsstovan krevur, at flutningurin skal vera í innilokaðum bili og undir skipaðum viðurskiftum.

- Í Klaksvík veita vit útróðrarmonnum tænastu við landing og ísi. Vit hava bæði krana og truck, og fiskurin verður koyrdur beinleiðis inn á landingarmiðstøðina, sigur Pól Fugløe.

# Teir standa so

**Í morgun var friðarligt fram Kósabrúnni, og á Stongunum var bara ljós í tí eina egningaskúrinum, tá ið vit vitjaðu fram við í lýsingini. Skip og bátar eru úti, men nú boðar hann aftur frá illveðri, og tá er einki at gera hjá útróðrarflotanum enn at geva tol og bíða, til hann blíðkar veðrið aftur**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Líðhamar er ein av teimum stóru útróðrarbátunum í Klaksvík. Hetta er ein 80-tonsari, sum roynir við línu. Við bátinum eru fýra mans, og tveir skipa fyri egning og agni í skúrinum uppi á landi.

Túrurin í Klaksvík í morgun byrjaði sum vanligt á Kósini, har vit plaga at fregnast, um okkurt rørist við bryggjukantin. Men í morgun var einki lív í á Kósabrúnni, eingin bátur og at kalla einki fólk at síggja.

Av Kósabrúnni bar leiðin heim á Stengurnar, har útróðrarmenn hava sínar egningaskúrar og annars hava sína dagligu gongd, tá ið líkindi ikki eru til útróður.

### Bátarnir úti

Men í morgun var heldur einki serligt lív í á Stongunum. Bert í tí eina skúrinum var ljós, og har stákaðust tveir menn við at rudda skúrin og taka agn til næstu seturnar.

- Hetta er skúrurin hjá Líðhamri, sum er ein 80-tonsari. Vit eru tveir, sum stíla fyri egningini, og umborð á bátinum eru fýra mans. Teir vóru úti næstsíðstu nátt, settu 60 línur og fingu góð 5.000 pund, ein helmingur var gráur fiskur. Líðhamar er úti aftur í nátt, men enn eru teir ikki komir aftur. Hesaferð royna teir á bleytum botni, og teir eru neyvan væntandi fyrr enn seint seinnapartin.

Egnararnir siga, at fleiri bátar loystu í gjárkvøldið ella í nátt, men nú sigur hann aftur nógvan vind, so dagurin í dag verður hin seinasti í hesum umfari.

Í morgun er stilt, men hann lotar inn úr havinum, so tað kann vera eitt sindur tvassut í sjónum onkustaðni – í hvussu er hjá teimum smáu bátunum.

- Útróðrarbátarnir hava ligið um 100 pund á línuna, onkuntíð meira og onkuntíð heldur minni. Fleiri egna gággu, og tá er væl av gráum fiski uppi í veiðini. Tá ið grátt er uppi í veiðini, roynist túrurin vanliga, tí góður prísur er fyri toskin. Hýsuprísurin hevur eisini verið góður, men hann hevur ikki verið líka støðugur sum prísurin á toski.

Líðhamar egnir bæði gággu, kúfisk og høgguslokk.

### Egningin í lagi

Vit spurdu eisini, hvussu gongur at fáa línuna egnda, tá ið útróður er fylgjandi dagar. Líðahamar er stórur útróðrarbátur, og nógv lína skal egnast, tá ið regluligur útróður er.

- Jú, tað gongur væl. Tað er mest tilkomið fólk, sum egnir her hjá okkum. Aldurin liggur úr stívliga 40 árum og uppeftir – og onkur pensjónistur tekur eisini hond í við okkum, siga teir.

Meðan vit eru á bryggjuni, kemur ein truckur við einum platti av agni, sum teir báðir beinanvegin fara undir at fáa til høldar.

- Tit skriva ov lítið um vinnuna, men brúka mestu tíðina upp á tað, sum gongur fyri seg í Havn, siga teir argandi, men meina tað ikki illa.

Uppundir løgtingsvalið høvdu teir vitjan av ymiskum politikarum, sum komu



framvið at lata útróðrarmenninar vita, hvørjum teir vilja arbeiða fyri, um teir vórðu valdir.

- Vit høvdu vitjan av eitt nú Jóannesi Eidesgaard, løgmanni og John Johannesen, løgtingsmanni. Løgmaður var heilt uppi á loftinum í skúrinum her hjá okkum, siga teir.

### Betri umstøður

Annar leggur aftrat, meðan vit práta á bryggjuni, at hann hopar ikki, at Høgni Hoydal verður løgmaður, nú Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin samráðast um at skipa samgongu og landsstýri. Hví hann ikki ynskir Høgna til løgmann, sigur hann tó einki um hesa lítlu løtu, vit steðga á Stongunum.

Nú bæði Jóannes og John, sum undan valinum vitjaðu á Stongunum, eru afturvaldir, kunnu vit bara vóna, at teir ikki hava gloymt